FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Reglur um teldunýtslu til próvtøku

Umframt vanligu próvreglurnar eru hesar reglur galdandi fyri  teldunýtslu til próvtøku:

1) Studentarnir skulu sjálvir hava teldu við, meðan Setrið syrgir fyri útprentingini.
2) Um loyvt er at brúka orðabøkur til próvtøkuna, fæst atgongd til orðabøkur Sprotans á *uni_exam*. Studentarnir fáa loyniorð til *uni_exam* frá próvtøkueftirlitinum, beint áðrenn próvtøkan byrjar. Burtursæð frá *uni_exam*, sum bara er loyvt til nakrar próvtøkur, er ikki loyvt at brúka Internetið yvirhøvur.
3) Umframt serligu atgongdina til orðabøkur Sprotans kann studenturin bara vera á skjalinum, sum er lagt á útflýggjaða geyman, og um notur eru loyvdar, er eisini loyvt at fara inn á tær, men tær eiga at vera goymdar fyri seg í serligari mappu, soleiðis at próvtøkueftirlitið skal kunna hava eftirlit. *Um eingi hjálparamboð eru loyvd, skal studenturin bara vera á skjalinum á geymanum (sum hevur serligan lit).*
4) Studenturin fær geyma við skjali við arkhøvdi, sum bert kann verða nýtt í Word (ella Word-sambæriligum forriti) frá deildini, áðrenn próvtøkan byrjar, og mælt verður til at nýta skriftina Times New Roman, stødd 12 og hálvtannað regluglopp.
5) Tá studenturin er liðugur og ætlar at lata inn, skal geymin handast eftirlitsfólkinum, sum syrgir fyri, at tilfarið verður prentað út. Studenturin verður sitandi á sínum plássi til eftirlitsfólkið kemur aftur við útskrivaða uppgávusvarinum. Loyvt er at prenta út eitt royndarprent. Til ber vanliga bara at prenta út seinasta tíman av próvtøkutíðini. Tá próvtøkutíðin er farin, skal alt vera útprentað og lagt í próvtøkuumslagið.
6) Tað er studenturin sjálvur, sum velur tey ørk, ið skulu latast inn til døming. Øll útskrivað ørk skulu byrja við navninum á studentinum og hava dagfesting og síðunummar á. Undirskrift skal vera á seinasta arki. Geymin kann ikki nýtast sum kladda ella sum skjalprógv fyri, hvat møguliga skuldi verið latið inn.
7) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av regluliga at goyma tekstin, meðan próvtøkan fer fram. At teksturin ikki er goymdur, gevur ikki grundarlag fyri at fara til endurpróvtøku.
8) Um streymslit er, meðan próvtøkan fer fram, ella aðrir trupulleikar taka seg upp, sum ikki beinleiðis kunnu vera bøttir í sambandi við at nýta telduútgerð, heldur próvtøkan fram, uttan at teldan verður nýtt. **Tí er tað eisini sera týdningarmikið, at teksturin javnan verður goymdur á geymanum.**
9) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at telduútgerðin riggar. Eingin teldukønur verður til staðar at hjálpa. Um so er, at trupulleikar stinga seg upp í telduútgerðini hjá tí einstaka, verður ikki longt um próvtøkutíðina, ei heldur verður møguleiki fyri endurpróvtøku. Studenturin skrivar tí víðari við hond og kann annars til eina og hvørja tíð fara at skriva við hond heldur enn teldu.
10) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at ognin er tryggjað móti stuldri ella herverki, meðan ognin stendur í próvtøkuhølinum.

- Studenturin skal møta í góðari tíð og skal, áðrenn próvtøkan byrjar, tryggja sær, at teldan virkar, sum hon skal. Hann skal eisini tryggja sær, at geymin virkar saman við telduni.
- Staðfestir studentur fyri próvtøkubyrjan, at teldan ikki virkar, ella tað er sannlíkt, at teldan ikki fer at virka gjøgnum alla próvtøkuna, t.d. tí at trupulleikar eru við ritbúnaði ella tí at streymkápilin er gloymdur, má studenturin skriva við hond.

Samtyktar á lestrarráðsfundi 13.05.2015